# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Sjálvandi er møðin enn í kroppinum. Men eg haldi tað sær út til, at vit allar veruliga eru klárar nú.*

*Durita Ljósstein*

# Tað seinasta verður togað fram

**Hóast nógvar dystir og drúgva ferðing so ivast Durita Ljósstein ikki í, at føroysku kvinnurnar megna at toga seinastu kreftirnar fram hetta til sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Saman við málverjunum báðum, Tommu og Fríðu Petersen, sæst Durita her bíða eftir bussinum, sum skuldi koyra liðið til venjing hósmorgunin*

Sum partur av FM-liðnum hjá Stjørnuni er Durita Ljósstein millum teirra, sum hava havt einar strævnar páskir. Men hóast hetta og hóast tríggjar flogferðir síðani sunnudagin, so heldur hon, at bæði hon og liðfelagarnir eru til reiðar at trýsta seg seinasta pettið, nú dystirnir í Challenge Trophy-kappingini eru á skránni.

- Sjálvandi er møðin enn í kroppinum. Men eg haldi tað sær út til, at vit allar veruliga eru klárar nú, sigur Durita Ljósstein.

- Hóast vit ferðaðust í allan gjár, so helt eg, at venjingin í gjárkvøldið var betri, enn hon var í Danmark. Kanska føla vit nú, at nú er tað álvara. Vit umboða okkara land, tá vit spæla her niðri, og tá er tað ofta so, at tú klárar at toga seinastu kreftirnar fram.

### Bosnia favorittur

Sjálv var Durita partur av liðnum, sum fyri tveimum árum síðani var í Bosnia. Ta ferðina var tó avmarkað, hvussu stór mótstøðan var, og tí kenna føroysku spælararnir ikki so nógv til hini liðini.

- Cypros spældu vit ímóti í hálvfinaluni ta ferðina, og tær høvdu eitt fínt lið. Bosnia er eisini við hesaferð, og tær vóru rættiliga sterkar fyri tveimum árum síðani. Og helst mugu tær roknast sum favorittar, hóast eg ikki kenni nakað av liðunum nakað serligt. Og Finnland hevur helst eisini eitt sterkt lið, so har verður nokk at hugsa um hjá okkum.

Men tað er kanska eisini stuttligari, tá kappingin er harðari, enn hon var seinast?

- Avgjørt. Eg veit ikki ordiliga, hvat hatta var fyri kapping, sum var seinast. Men tað er deiligt, at kappingin hesa ferð verður størri. Tað ger tað í øllum førum nógv stuttligari at spæla, sigur Durita Ljósstein.

# Joan er ivamálið

**Enn er ikki greitt, nær tað verður satsað uppá, at fóturin hjá Joan Midjord Djordjevic er nóg stinnur til dyst í Challenge Trophy kappingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Enn er ivasamt hvussu verður við Joan*

**Larnaca, Cypros:** Harðasta skráin á ferðini hjá føroyska kvinnulandsliðnum hevur hoyrt heima hjá Tinu Jacobsen, sum er fyrisoterapeutur.

Við fimm dystum í fimm dagar er eingin ivi um, at ein fyrisoterapeutur skal hava sítt at síggja til, men hesa ferð byrjaðu marathonviðgerðirnar hjá henni longu sunnudagin. Ikki minst, tí nógvar av spælarunum vóru partur av hørðu FM-finalunum.

Við einum undantaki hevur talan tó »bert« verið um eymar vøddar, sum skulu mýkjast nakað, soleiðis at møðin skjótari fer úr kroppinum, men hjá Joan Midjord Djordjevic hevur støðan tó verið nakað verri.

### Kunnu satsa

Ein keiktur fótur krevur sína tíð at koma fyri seg, og stóri spurningurin er, um Jakob Jónsson er áhugaður í at spæla russiska roulettu við einum av týdningarmestu spælarunum hjá Føroyum.

Tí við einum væl tapaðum fóti ber til at spæla – í øllum førum ein dyst. Joan sýndi eisini, at hon kann bíta pínuna í seg, tá hon noktaði at geva skarvin yvir í finaludystinum, har hon spældi stóran part av seinna hálvleiki.

Men verður hon tveitt á vøllin, so er vandi fyri, at fóturin aftur versnar, og so er spurningurin, hvat er vunnið. Og tann spurningurin verður helst ikki svaraður, fyrr enn beint undan dystinum móti Estlandi.

Hóast føroysku venjararnir enn ikki hava sæð aktuellu útgávuna av mótstøðuliðunum, so verður roknað við, at Estland og Cypros eru harðastu mótstøðuliðini í okkara bólki. Og við Bosnia sum stórfavoritti at vinna hin bólkin kann týdningurin av einum fremsa plássi í bólkaspælinum verða stórur. Og tí er spurningurin altso, um venjarin velur at brúka Joan longu nú.

Tann spurningurin verður tó helst ikki svaraður fyrr enn seinnapartin í dag.